15. februar 2018
Mál: 16/01048-85
Viðgjørt:

**Løgtingið**

**Løgtingsmál nr. F-005/2017: Frágreiðing sambært §51, stk. 4 í tingskipanini um javnstøðupolitikk**

**Frágreiðing**
**til**
**aðalorðaskiftis**

Landsstýriskvinnan í almannamálum leggur við hesum "Javnstøðupolitikkur – tí tað loysir seg" saman við "Virkisætlan" fyri komandi fimm árini til aðalorðaskiftis.

**Harra formaður**
Sitandi samgonga hevur sett sær fyri, at øllum borgarum skulu tryggjast javnrættindi. Hvør einstakur skal eiga møguleikan at smíða sær eitt eydnuríkt lív eftir egnum huga og evnum og at taka lut og ábyrgd í samfelagnum. Hetta tryggjar sosialt og mentanarligt fjølbroytni, sum gevur trivnað og skapanarhug.

Í samgonguskjalinum hava vit sett okkum fyri at styrkja javnstøðupolitikkin, herundir javnstøðulógina. At gransking og hagtøl um arbeiðsmarknað og løn skulu raðfestast, eins og bæði kyn skulu eggjast til at nema sær útbúgving. Vit hava eisini staðfest, at børn hava rætt til bæði foreldrini, og at vit vilja virka fyri at styrkja hesi rættindi.

Vit vilja menna eitt tíðarhóskandi vælferðarsamfelag fyri alt fólkið í Føroyum, sum kann kappast við okkara grannalond um at draga fólk og virksemi til sín. Eitt samfelag við ríkum møguleikum, sterkum felagsskapi og javnbjóðis rættindum fyri okkum øll.

**Harra formaður**
Hóast at fólkatalið er vaksið seinastu árini, og ongantíð hava fleiri fólk búð í Føroyum enn nú, so er skeiva aldurs- og kynbýtið enn millum størstu avbjóðingar okkara. Eg eri sannførd um, at ein virkin og greiður javnstøðupolitikkur er eitt týðandi amboð fyri at fáa ungdóm og barnafamiljur at støðast, virka og trívast í Føroyum.

Javnstøða er ein hugsjón – ein grundhugsan um, hvat er eitt gott og rættvíst samfelag. Kvinnur og menn hava rætt til javnstøðu, og viðurskifti eru, ið eiga at bøtast hjá kvinnum, og viðurskifti, sum eiga at bøtast hjá monnum, skulu vit fáa javnstøðu.

Javnstøða hevur týdning fyri eitt samfelag. Hon hevur týdning, tí samfelagið verður betri at liva í, meira kappingarført, og vinnulívið meira samansett. At øll hava somu møguleikar at mennast og trívast í øllum lívsins viðurskiftum er ein fyritreyt fyri vøkstri og menning.

Eirargarður 2 • FO-100 Tórshavn
Tel: +298 304000 • Fax: +298 304045 • E-mail: amr@amr.fo

Hóast nógv er batnað á javnstøðuøkinum, so hava vit ikki veruliga javnstøðu í Føroyum. Vit vænta ymiskt av gentu og dreingi, og hesar væntanir ávirka, hvørjar útbúgvingar gentur og dreingir velja, og hvørjum størvum kvinnur og menn arbeiða í. Stórur ójavni er í útgoldnum lønum til kvinnur og menn. Helvtin av kvinnunum á arbeiðsmarknaðinum arbeiðir niðursetta tíð. Og fimta hvør kvinna, sum arbeiðir niðursetta tíð, ynskir at fara upp í tíð, men skipanin loyvir tí ikki.

Hetta mugu vit gera okkurt við.

**Harra formaður**
At broyta eitt samfelag tekur tíð og krevur, at arbeitt verður á fleiri mótum og stigum, og tað er neyðugt at raðfesta. Sum landsstýriskvinna í javnstøðumálum havi eg valt at savna meg um fimm høvuðsøki:

- Økt tilvitan um kyn og javnstøðu
- Javnstøða í arbeiðslívinum
- Menn og javnstøða
- Harðskapur og haturstala
- Lóggáva og altjóða sáttmáli
-

Fyri at fremja størri javnstøðu á hesum høvuðsøkjum havi eg gjørt eina virkisætlan við 27 ymsum átøkum.

Hóast javnstøðumál er eitt málsøki hjá mær, fevnir javnstøða tvørtur um málsøki hjá øðrum landsstýrisfólkum. Tí er virkisætlanin gjørd í samstarvi við hesi landsstýrisfólk, og viðkomandi stovnar, feløg og nevndir.

Eg gleðist um, at arbeiðið at gera virkisætlanina hevur fingið so jaliga og góða undirtøku millum landsstýrisfólkini og avvarðandi partar, tí júst tað, at semja er um, at vit vilja fremja hetta týðandi mál, at viljin er til at lyfta í felag, er avgerandi, skulu vit gera Føroyar til eitt enn javnari samfelag at liva í.

**Harra formaður**
Grundarlag undir hesum orðaskifti er Javnstøðupolitikkurin – tí tað loysir seg og Virkisætlanin. Endamálið við aðalorðaskiftinum er at varpa ljós á støðuna í Føroyum, tá um javnstøðu millum kvinnur og menn ræður.

Í tilgongdini at orða politikkin og gera virkisætlanina, havi eg vigað fyri og ímóti, um javnstøðupolitikkurin skal snúgva seg um javnstøðu millum kvinnur og menn, ella um javnstøðuhugtakið skuldi verðið víðkað til eisini at fevna um onnur øki, har vit vita at mismunur eisini kemur fyri – tað verið seg vegna brek, aldur, uppruna og aðrar javnmetingar. Eg eri tó komin til ta niðurstøðu, at í hesum arbeiðinum hugsavna vit okkum um kynjavnstøðu.

Grannalond okkara hava í fleiri ár havt lóggávur, sum skulu forða fyri mismuni á arbeiðsmarknaðinum vegna brek, uppruna og aðrar vandar fyri mismuni. Hesar lógir hava virkað í fleiri ár, og eru nú – ella eru um at verða – samanskrivaðar í eina lóg.

Í Føroyum hava vit einans havt javnstøðulógina frá 1994 og lógina um at banna mismuni á arbeiðsmarknaðinum orsakað av breki frá 2011, og eg meti, at vit eru komin munandi styttri á øllum hesum økjum í mun til okkara grannalond.

Heldur enn at víðka hugtakið nú, haldi eg at vit eiga at raðfesta at gera tær lógirnar sum mangla og fáa hesar at virka, áðrenn vit gera eina felags diskriminatiónslóg.

**Harra formaður**
Í Føroyum hava vit eina demografiska avbjóðing, av tí at vit hava eitt undirskot av kvinnum. Nærum 2000 færri kvinnur enn menn búgva í Føroyum, hóast fólkatalið er hækkað seinnu árini. At vit hava eitt undirskot av kvinnum í burðarførum aldri, hevur sera neiliga ávirkan á samfelagið alt sum tað er, langt inn í framtíðina.

Júst vantandi javnstøða kann vera ein týðandi orsøk til, at fleiri føroyskar kvinnur velja at búgva aðrastaðni enn í Føroyum. Tað er týdningarmikið, at vit skipa samfelagið soleiðis, at bæði kvinnur og menn trívast og kenna seg hava møguleikar at mennast, og tí haldi eg, at størri fokus á javnstøðu ivaleyst hevði bøtt um henda trupulleika.

Kanningar í grannalondum okkara vísa, at kvinnur í størri mun enn menn hava lyndi til at flyta burtur frá útjaðaranum til miðstaðarøkið, og vit síggja sama rák í Føroyum. Ein frágreiðing kann vera, at føroyska samfelagið er siðbundið við eintáttaðum vinnulívi og fiskiveiðumentan. Nógvir fyrimunir eru við hesum, men tað merkir eisini fleiri avbjóðingar.

Ungu ættarliðini eru altjóðagjørd og ganga ikki longur í fótafetum foreldranna, og tey eru ikki eins støðuføst og ættarliðini undan teimum. Opin og tollynt samfeløg eru meira dragandi, og hetta er ikki ein serføroysk avbjóðing, tí onnur smá samfeløg og øki missa eisini partar av yngra ættarliðinum. Men meðan trupulleikin í øðrum londum er, at kvinnur flyta til stórbýirnar, er trupulleikin í Føroyum, at kvinnurnar flyta av landinum.

Tað merkir færri kvinnur á arbeiðsmarknaðinum, færri kvinnur at vera makar og færri kvinnur at eiga børn.

Hetta eiga vit at hava í huga, um vit vilja halda fram sum eitt blómandi samfelag, har fólk trívast og mennast.

**Harra formaður**
Longu tíðliga í lívinum møta gentur og dreingir vaksnum, sum hava ávísar væntanir til, hvussu tey skulu bera seg at, sum ávikavist ein rættur drongur ella ein røtt genta, og so líðandi verða tey sosialiserað inn í kynleiklutirnar. Hetta hevur avgerandi týdning í mun til, hvørji val tey gera seinni í lívinum, til dømis viðvíkjandi útbúgving, starvi og familjulívi. Kynleiklutirnir kunnu avmarka teirra møguleikar at menna síni evni og áhugamál. Bæði á dagstovnum, í skúlum og í samfelagnum annars kunnu børn uppliva, at ymiskt virksemi er ætlað øðrum kyninum, og tí kann vera trupult at bróta tey sosialu mynstrini.

Seinastu áratíggjuni eru tó stórar broytingar hendar í kynleiklutamynstrinum, og formliga eru menn og kvinnur javnsett. Men framvegis er neyðugt at varpa ljós á, at tað einstaka barnið skal kunna menna seg út frá egnum fortreytum, og ikki út frá, um tey eru genta ella drongur.

Vit kunnu og skulu ikki lóggeva okkum burtur úr avmarkandi kynleiklutum, men vit eiga miðvíst í felag at skapa størri frælsi. Tí havi eg í virkisætlanini átøk, sum geva fakfólki og øðrum, sum eru um børn og ung, amboð í mun til at gerast meira tilvitað um kyn, og um hvørjar ótilvitaðar væntanir, ið vit kunnu hava til børn, orsakað av okkara siðbundnu fatanum av

kynleiklutum. Starvsfólk eiga at stimbra og stuðla børnum at styrkja síni áhugamál og menna síni evni, uttan mun til kyn.

Tað eigur ikki at vera kynið, sum er avgerandi, tá gentur og dreingir velja sær útbúgving ella yrkisleið. Børnini eiga at kenna, at tað eru ikki kynmørk fyri, hvat tey velja. Tey eiga at kenna, at tey kunnu velja tað, sum tey hava hug og evnir til.

**Harra formaður**
Vit hava ein sera kynbýttan arbeiðsmarknað – í summum vinnum eru nærum bara menn, í øðrum nærum bara kvinnur. Tá arbeiðsmarknaðurin er so kynbýttur, er væl hugsandi, at øll ikki brúka síni evni til fulnar, samstundis sum arbeiðsmarknaðurin verður óliðiligur, og hevur trupult at umstilla seg, tá umstøðurnar broytast. Arbeiðsmarknaðurin í dag krevur fjølbroyttar loysnir.

Stórur munur er á, hvørjar framhaldsútbúgvingar gentur og dreingir velja. Ein stórur partur av útbúgvingunum hevur stóra yvirvág av øðrum kyninum. Vit kunnu taka sum dømi, at tað eru bara nakrir heilt fáir dreingir, ið hava valt at gerast sjúkrarøktarfrøðingar, talið av mannligum lærarum og námsfrøðingum er lágt, og tað eru ikki nógvar gentur, sum velja at fara á Vinnuháskúlan fyri at gerast skipsførarar ella maskinmeistarar.

Vit kunnu tí vænta, at kynbýtið, sum er á arbeiðsmarknaðinum í dag, fer at halda fram langt inn í framtíðina, og skal hetta broytast, mugu vit gera átøk sum broyta hetta mynstrið. Í virkisætlanini er dentur lagdur á hetta.

Men tað er ikki bara tað at hava ein liðiligan arbeiðsmarknað, sum skjótt kann umstilla seg til broyttu umstøðurnar, sum hevur týdning. Hyggja vit eftir samlaðu lønarútgjaldingunum, so forvinna menninir tilsamans næstan tvær ferðir so nógv sum kvinnurnar.

Ein orsøk er, at størv, har stór yvirvág er av kvinnum, eru lægri lønt og hava avmarkaðar møguleikar fyri uppstíging.

Ein onnur orsøk er at meira enn helvtin av øllum kvinnum arbeiðir niðursetta tíð.

Fleiri familjur velja, at kvinnan arbeiðir niðursetta tíð, meðan børnini eru smá. Men tað er ikki so, at helvtin av kvinnunum á arbeiðsmarknaðinum hevur smábørn. Í stóran mun endurspeglar hetta virðið, vit sum samfelag seta á arbeiðið hjá kvinnum. Og hetta endurspeglar ójavna valdsstrukturin í samfelagnum.

Kvinnur hava framvegis høvuðsábyrgdina av ólønta arbeiðinum í heimunum, og helvtin av kvinnum í Føroyum arbeiðir dagliga ólønt í 3-6 tímar. Hetta hevur ikki einans ávirkan á ta einstøku kvinnuna, men eisini á samfelagsbúskapin í mistari inntøku.

Og tað er ikki altíð av egnum vilja, at kvinnur arbeiða niðursetta tíð. Fimta hvør kvinna, sum arbeiðir niðursetta tíð, kundi hugsað sær at arbeitt meira. Ein stórur partur av størvum, har stór yvirvág er av kvinnum – eitt nú innan eldrarøkt, á dagstovnum og á sjúkrahúsum – er normeraður sum parttíðarstørv, og tað hevur víst seg at vera trupult at broyta hetta.

Tað er umráðandi at vit skapa fleiri starvsmøguleikar og hava ein rúmligari og familjuvinaligari arbeiðsmarknað, har tað ber til at sameina arbeiðs- og heimalív. Vit hava brúk fyri báðum kynunum, tí tað er tá øll eru við, at vit røkka teimum bestu úrslitunum.

**Harra formaður**
Barnsburður og barsil eru týðandi samfelagsøki, sum viðkoma øllum samfelagsborgarum. Tað er umráðandi at skapa so góð kor fyri barnafamiljur, sum yvirhøvur gjørligt. Barsilsskipanin er nógv ment seinnu árini, og sum heild má sigast, at hon er góð. Men rúm er fyri batum. Eitt nú eigur barsilsskipanin at vera meira smidlig, og skipanin eigur í størri mun at eggja pápum at taka barsilsfarloyvi.

Barsilsskipanin gevur foreldrum rætt til farloyvi í eitt ár eftir barnsburð. Mamman hevur rætt til 4 vikur undan barnsburði, og fyrstu 14 vikurnar eftir barnsburð eru markaðar til mammuna. 4 vikur eru markaðar til pápan. Eftir 14. viku kunnu foreldrini býta 28 vikur sínámillum. Loft er sett á útgjaldið, soleiðis at tað loysir seg betur at lata tað foreldrið, sum hevur lægri løn, taka farloyvið.

Støðan í Føroyum er hon, at mammurnar taka 93% av barnsburðarfarloyvinum, meðan pápar taka 7%. Fleiri av hinum Norðurlondunum hava skipanir, har t.d. størri partur av barsilstíðini er markaður til pápan. Og tað vísir seg, at pápar í stóran mun taka tær vikur í farloyvi, sum eru markaðar teimum.

Kanningar vísa, at jú longri tíð kvinnurnar eru burturi frá arbeiðsmarknaðinum, tess størri verður lønargjógvin millum kynini. Og tað vísir seg at fyri hvønn mánað, sum pápin er í barnsburðarfarloyvi, hækkar framtíðar lønin hjá mammuni við nærum 7%.

At pápar fara í barsilsfarloyvi gagnar tó ikki bara lønarlagnum hjá kvinnunum, og tí fíggjarstøðuni hjá familjuni, men gagnar eisini pápum og børnum teirra. Royndir vísa, at øll familjan trívist betur, tá páparnir eisini fáa møguleika at vera heima hjá børnunum. Pápar, sum hava verið í barnsburðarfarloyvi, fáa eitt tættari samband við barnið, og pápar hava stóran týdning í mun til kensluligu og andligu menningina hjá barninum, eins og menningina av innlivingarevnum barnsins.

At pápar eru saman við sínum børnum tíðliga í lívinum hevur jaliga ávirkan á teirra sjálvvirði og børnini klára seg betur seinni í lívinum.

Men umráðandi er eisini, at umsorganin hjá monnunum fremur størri javnstøðu, tí børn, sum síggja pápar sínar taka lut í dagligu umsorganini, hava minni lyndi at halda seg til siðbundnu kynmynstrini; gentur velja í minni mun siðbundin størv, og dreingir, tá teir verða menn, hava størri sannlíkindi at gera húsligt arbeiði.

Eg haldi, at tað ber til at arbeiða á fleiri økjum til tess at eggja pápum at fara í barsilsfarloyvi. Eitt nú eiga allar vikur, sum verða lagdar afturat barnsburðarfarloyvinum frameftir at verða markaðar pápunum. Barsilsskipanin eigur at vera meira smidlig, soleiðis at foreldur í størri mun sjálvi kunnu avgera, nær tey fara í barsil. Og í triðja lagi kunnu upplýsingarátøk gerast, sum birta hugin ella gera tað meira góðtikið hjá pápum at fara í barsilsfarloyvi.

**Harra formaður**
Javnstøðulógin hevur skjótt 25 ár á baki og er ikki broytt øll hesi árini. Tað var eitt stórt frambrot, tá javnstøðulógin í síni tíð kom, og hon hevur sum heild virkað væl.
Eg haldi tó, at tíðin nú er komin at dagføra lógina.

Javnstøðulógin leggur í stóran mun dentin á, at Javnstøðunevndin skal hava eftirlit og virka sum kærumyndugleiki. Hetta hevur í ávísum førum verið óheppið, tí kærurnar ofta snúgva seg um arbeiðsmarknaðarmál, og nevndarlimir kunnu vera inhabilir í hesum málum. Harafturat tekur viðgerðin av kærumálum nógva tíð og orku hjá nevndini. Tíð og orka, sum eg haldi, at Javnstøðunevndin heldur átti at brúkt til at fremja javnstøðu við upplýsing og kunning í almenna rúminum.

Árliga játtanin til Javnstøðunevndina á fíggjarlógini hevur seinastu 10 árini meira ella minni staðið í stað. Javnstøðunevndin hevur víst á, at fíggjarliga orkan er ikki til at fremja tær ætlanir, sum nevndin kundi hugsað sær, og at umstøðurnar at fáast við javnstøðunevndararbeiði eru einamest í frítíðini. Tað haldi eg ikki er nøktandi, um vit veruliga ynskja, at Javnstøðunevndin skal virka fyri at fremja javnstøðu.

Uppgávurnar eru nógvar og tíðarkrevjandi, og eg haldi, at skal nakað munagott fáast burturúr, eigur nevndin at verða knýtt at eini skrivstovu. Hetta er tí eisini eitt av átøkunum í virkisætlanini. Skrivstovan kann fyrireika mál til nevndina at taka støðu til, eins og at útinna tær ætlanir, sum nevndin setir út í kortið. Hon kann samstundis í størri mun vera tøk hjá myndugleikum, stovnum, feløgum og einstaklingum at venda sær til at fáa hjálp og ráðgeving í javnstøðuspurningum. Ein skrivstova kann á ymsan hátt varpa ljós á javnstøðumál, og standa fyri átøkum sum fremja størri javnstøðu.

Hóast kærumál og eftirlit hava tikið nógv av orkuni hjá Javnstøðunevndini, so hevur hetta arbeiðið tó eisini verið sera týðandi. Nøkur kærumál hava broytt mannagongdir í sambandi við starvsfólkamál, og eftirlitið, sum Javnstøðunevndin hevur havt við javnstøðu í nevndum og ráðum, hevur virkað við til, at hugburðurin nú nógva staðir er broyttur. Tað tykist sum at bæði tá tað snýr seg um at velja nevndir og ráð, men eisini í øðrum førum, verður lagt til merkis, um javnstøða ikki er og tað verður talað at.

Henda ásetingin í lógini um javnstøðu í nevndum og ráðum røkkur tó ikki inn í partafeløg, sum tað almenna eigur ella eigur í. Tað hevur fleiri ferð verið tikið fram, at henda áseting átti at verðið víðkað til eisini at fevna um hesi feløg.

Spurningurin er, um vit náa málinum best við at lóggeva ella um vit røkka sama endamáli við at gera eina samtykt um, at vit í landsstýrinum, tá vit velja nýggjar nevndir í almenn feløg, leggja dent á javna kynumboðan. Sjálv meti eg, at tað er natúrligt at lóggeva um hetta. Eitt er so vist, at allar kanningar og royndir vísa, at tað fremur størst framburð og betri úrslit, tá bæði kynini eru við.

Eg havi í virkisætlanini ongi átøk um at áleggja privatum fyritøkum krøv um javnstøðu í nevndum og leiðslum, men eg haldi, at tað er áhugavert at kanna og upplýsa um fyrimunirnar við javnstøðu og at eggja til eina størri javnstøðu, eisini í privata geiranum.

Stórar altjóða fyritøkur hava við góðum úrslitum orðað javnstøðupolitikkir fyri teirra arbeiðspláss, eitt nú Volvo og IKEA. Javnstøðupolitikkurin snýr seg um at seta sær mál um at fáa javnstøðu millum kynini á øllum stigum í fyritøkuni, tí fyritøkan fær betri fíggjarlig úrslit og starvsfólk trívast betur. Mál eru sett sum til dømis at burturbeina lønarmun millum kynini, at hugsa javnstøðu, tá fólk verða sett í starv og at gera arbeiðsplássið attraktivt til tess at fasthalda starvsfólk. Allir leiðarar og stjórar fáa harafturat undirvísing í javnstøðu.

Eitt av átøkunum í virkisætlanini er at fáa í lag samstarv við nakrar føroyskar fyritøkur um at fremja størri javnstøðu, við at brúka royndir frá øðrum londum, eitt nú líka løn fyri sama arbeiði, har hetta hevur givið góð úrslit.

**Harra formaður**
Javnstøða er ein samfelagsavbjóðing, sum eigur at vera eitt felagsátak og eitt felagsmál.
Tað er mín vón, at vit – við grundarlagi í javnstøðupolitikkinum og virkisætlanini – fáa eitt gott politiskt orðaskifti um hesi týðandi viðurskifti, og at semja fæst um, at arbeiðið at fremja størri javnstøðu heldur fram.

Latið okkum í felag – kvinnur og menn – gera okkara til, at Føroyar gerast eitt enn betri samfelag at liva í, har kvinnur og menn trívast og hava somu møguleikar.
Tað loysir seg, snøgt sagt, ikki at lata vera!
Takk fyri harra formaður.

Skjal:
“Javnstøðupolitikkur – tí tað loysir seg” og “Virkisætlan”

Almannamálaráðið, tann 15. februar 2017

Eyðgunn Samuelsen
landsstýrismaður

/ Eyðun Mohr Hansen